

*Regnváta myndin "Norðan" frá 1957*



*Litirnir eru fáir og skipaðir í stórum, einslittum flatum, har dentur er lagdur á heildina*



*Dýpdin í grøna litinum tykist botnleys, samstundis sum gjørt verður vart við yvirflatan og tað tilfarsliga í litum og flatu við litblettum og rennandi máling*

# Málaraskaldið 100 ár

*Framhald av síðu 29*

eini fiskivinnutjóð, men sum Mikines hevur hevjað upp og dramatiserað til at snúgva seg um menniskjans lítilleika í tilveruni. Í forgrundini stendur ein kvinna, og um hana standa tvey børn. Meðan drongurin, ið hyggur eftir sluppunum í miðgrundini, sær rættiliga vanligur út, eru andlitini á hinum báðum átøk óhugnaligum deyðamaskum, ið bera boð um sakn, angist og deyða. Óhugnakenslan økist av bygnaðinum við tí monumentaliseraða menniskjabólkinum í forgrundini, hvørs andlit mynda ein trýkant, ið verður aftursvaraður av sluppunum, sum mynda ein øvugtan, óstøðugan trýkant. Perspektivið er eisini yvirdrivið soleiðis, at fólkini gerast øgiliga stór, meðan sluppirnar eru minkaðar niður í lítið og einki sum fyri at lýsa teirra lítilleika í mun til ta vandamiklu og lagnutungu ferðina. Eins og symbolistisku myndir Munchs er hendan merkt av einfeldi og samanheingi. Persónarnir eru av-indivitaliseraðir, kenslurnar altíð galdandi. Formarnir eru sera einfaldir, allar naturalistiskar detaljur eru at kalla burtur. Litirnir eru fáir og skipaðir í stórum, einslittum flatum. Dentur er lagdur á heildina. Alt hongur saman í myndini og alt er ein avleiðing av hvørjum øðrum.

## Grønt

Tá slakar 100 myndir brádliga eru til taks í staðin fyri tær 20-25, ið vanliga eru at síggja í Listaskálanum, er kanska ikki so løgið, at tú leggur merki til okkurt, sum tú ikki hevur hugsað um fyrr í samband við listafólkið. Eg havi sæð bæði grindadráps- og dansimyndir hjá Mikines áður, men eftir at hava sæð 11 teirra í senn í einum rúmi gjørdist greitt, at mær slett ikki dámar tær. Hátíðardámurin, sum málarin megnar at stýra í teimum myrku myndunum, tykist í hesum myndum sjálvhátíðarliga nationalur. Bygnaðurin er spennandi, dramatiskur og møguliga inspireraður av fronskum romantikarum sum Delacroix og Géricault, men myndevnið tykist onkursvegna gamalt, fjart og ótíðarhóskandi, sum møguliga er áhugavert sum fólkalívslýsingar.

Hinvegin ger henda framsýning av álvara greitt, hvussu stórur koloristur Mikines eisini var við einari heilt serligari kenslu fyri reyðum og grønum. Ymsastaðni á framsýningini hanga grønar tulkingar av náttúruni í Mikinesi, ið skara framúr. Um hesar høvdu hingið saman, var samanhangurin greiðari, eins og góðskan hevði sæst betur. Tann einasta av hesum myndunum, ið er av álvara kend, er "Norðan" (1957), tann grøna, regnváta myndin við ælaboganum. Fleiri av hesum grønu myndunum, ið eru frá fimmti og sekstiárunum, minna um akvarelmyndir við tunnum litfarrum, ið flóta inn í hvønn annan. Dýpdin í grøna litinum tykist botnleys, samstundis sum gjørt verður vart við yvirflatan og tað tilfarsliga í litum og flatu við litblettum og rennandi máling.

## Portrettmyndir

Portrettmyndir eru ofta málaðar til privata nýtslu, t.d. bílagdar av einstaklingum. Portrettmyndin av Mykineskonuni í Listaskálanum úttrykkir í vakurleika og kærleika nakað væl út yvir tað privata, og sama er galdandi fyri myndina, sum Mikines málaði av pápa sínum og sum kann upplivast á framsýningini í Listaskálanum inntil 12. mars. Hesi bæði portrettini skuldu saman við nøkrum fáum øðrum meistarligum portrettum fingið betur pláss á framsýningini. Í mun til hvussu væl tað lá fyri hjá Mikines at málbera seg um sína egnu og um aðra list, tykist tað løgið, at so lítið er gjørt burtur úr tí. Men sum heild er lítið gjørt burtur úr framsýningini tekstliga sæð. Framsýningarskráin er sostatt avmarkað til ein ótalmerktan lista við heitum, árstali og ávísing av hvør eigur myndirnar. Hetta er ikki nóg gott til eina framsýning sum hesa og møguliga er hetta eitt tekin um, at tann lovaði listfrøðingurin í Listasavninum enn ikki er farin til arbeiðis.

Á 100-ára degnum verður Mikines-kvøld við hugleiðing hjá Kára Mikines um pápan og fyrilestri hjá Aðalsteinn Ingálvsson, sum er í ferð við at skriva bók um Mikines. Mikines-kvøldið verður í Listaskálanum 23. februar kl.19.00